# Jógvan við Keldu: Nú er nokk sagt og nokk misskilt

**- Nú er nokk sagt, og nú er nokk misskilt, sigur Jógvan við Keldu, eftir at fleiri politikarar úr bæði andstøðu og samgongu hava funnist harðliga at viðmerkingunum hjá landsstýrismanninum í Degi og Viku fríggjakvøldið**

RAPA-HJÚNINI
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Jógvan við Keldu segði við Dag og Viku, at hann helt tað vera eina størri andsøgn, at Rapa-hjúnini yvirhøvur vóru sloppin inn á læraraskúlan.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, segði at viðmerkingarnar vóru óhepnar. Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins, helt at løgmaður átti at geva Jógvani við Keldu eina kraftiga átalu. John Johannessen, tingmaður, førdi fram, at um tað er soleiðis, at vit nokta fólki at nema sær útbúgving í Føroyum, bert tí tey hava útlendskan uppruna, so kann hetta møguliga gerast okkum ein stórur smeitur.

Sjálvstýrisformaðurin Kári P. Højgaard segði um viðmerkingarnar hjá Jógvani við Keldu, at tað átti at fingið fylgir, meðan Høgni Hoydal úr Tjóðveldisflokkinum helt, at viðmerkingarnar hjá landsstýrismanninum vóru tekin um, at tað liggur ein ódámligur politikkur aftanfyri úttalilsini hjá Jógvani við Keldu, og at tað átti at fáa avleiðingar beinanvegin. Jenis av Rana úr Miðflokkinum segði, at viðmerkingarnar vóru til at gráta yvir, og at hetta er prísurin, sum Javnaðarflokkurin má gjalda fyri at hava fingið løgmann

Jógvan við Keldu sigur, at nú er nokk sagt í hasum málinum, og har er nokk misskilt.

- Hatta er mín einasta viðmerking í løtuni. Eg vendi aftur seinni, sigur Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í innlendismálum.



Viðmerkingar til úttalilsini hjá Jógvani við Keldu:

# Jenis: – Hatta e

RAPA-HJÚNINI
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

### Sjálvstýrisformaðurin: Sjálvsagt eigur tað at fáa fylgir

- Tað er ótrúliga óheppið, at Jógvan við Keldu skal stíga fram í Degi og Viku og siga slíkt, sigur Kári P. Højgaard, formaður í Sjálvstýrisflokkinum, um viðmerkingarnar hjá Jógvani við Keldu um Rapa-hjúnini.

- Eg haldi undir øllum umstøðum, at maðurin eigur at taka orðini aftur, sigur Kári P. Højgaard.

- Sjálvsagt eigur tað at fáa fylgir fyri landsstýrismannin. Vit mugu fáa eina vissu fyri, hvat ið ætlanin er við útlendingapolitikkinum, sigur Kári P. Højgaard, formaður í Sjálvstýrisflokkinum.

### Jenis: Hatta er til at gráta yvir

- Eg vóni, at maðurin hevur fortalað seg. Man trúði ikki sínum egnu oyrum, tá man hoyrdi Jógvan við Keldu í Degi og Viku fríggjakvøldið. Hatta er til at gráta yvir, sigur Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum.

- Rapa-hjúnini eru fólk, sum eru komin til Føroyar og givið okkum nakað. Tað er alla æru vert, tað sum hasi fólkini hava klárað. Fyrimyndarligt. Tað er ræðuligt, at tey skulu uppliva slíkt. Bíblian tosar greitt um, hvussu man skal taka sær av teimum fremmandu: "Minnist til, at tit einaferð eisini vóru fremmand," sigur Jenis av Rana.

- Eg haldi, at úttalilsini hjá Jógvani við Keldu er linjan, sum Fólkaflokkurin legði áðrenn valið. Hetta er desideraður fólkaflokspolitikkur. Man tosar um altjóðagerð, men hetta stendur í stórari andsøgn til tað, sigur Jenis av Rana.

Jenis av Rana heldur, at hetta er prísurin, sum Javnaðarflokkurin má gjalda fyri at hava fingið løgmann.

- Tað vigar so nógv hjá Javnaðarflokkinum at fáa løgmann, so hetta munnu teir klára at svølgja. Meira av somu skuffu er helst væntandi, sigur Jenis av Rana.

### Rektarin: Hava ikki kroyst nakran burtur

- Hetta er ein møguleiki, sum fólk hava, tá tey koma til Føroyar. Rapa-hjúnini hava ikki kroyst nakran burtur, sigur Pauli Nielsen, rektari á Føroya Læraraskúla, sum júst hevur givið Rapa-hjúnunum føroyskt læraraprógv.

- Tey eru komin til Føroya í síni tíð og hava í veruleikanum eitt læraraprógv úr Rumenia. Tá tey byrja sum vikarar í Vestmanna skúla, so seta tey seg í samband við okkum fyri at vita, hvat skuldi til fyri at prógvið hjá teimum kundi verða góðtikið á jøvnum føti við eitt føroyskt prógv, sigur Pauli Nielsen.

- Tey eru komin inn á skúlan undir øðrum fortreytum. Tey eru komin inn í flokkin fyri at supplera. Tey hava ikki kroyst nakran føroying vekk. Vit hava fyrr tikið ímóti útlendingum upp á júst sama grundarlag. Hetta er púra vanligt, sigur Pauli Nielsen.

Hann leggur afturat, at tað er óheppið, at Jógvan við Keldu hevur sagt tað vera eina størri andsøgn, at Rapa-hjúnini yvirhøvur vóru sloppin inn á læraraskúlan.

### Vestmenningur: Ongin heilsan at senda Rapa-hjúnunum

Ingi Olsen úr Vestmanna heldur, at tað var sera illa timað av Jógvani við Keldu at undrast á, hví Rapa-hjúnini yvirhøvur vóru sloppin inn á læraraskúlan, nú tey kunnu gleðast um at hava fingið prógv frá Føroya Læraraskúla.

- Hatta er ikki ein heilsan at senda á próvdegnum. Hatta vóru nøkur ótrúliga klossut úttalilsi frá Jógvani